# ítróttur

Nr. 236 • hósdagur • 8. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Runavíkingur í B68-málið

**Albert Sævarsson verður ikki á Toftum komandi ár. Í hansara stað kemur evnaríki Tórður Thomsen at standa**

**B68-MÁLVERJI**
*Jákup Mørk*

Á Toftum hava tey í vetur roynt at rigga seg til, nú B68 aftur skal hava umboð í bestu deildini.

Ein av spælarunum, sum fólk uttan iva høvdu sett stórt álit til komandi árið, er Albert Sævarsson, sum hevur verið ein sera stinnur málverji hjá felagnum. Men hann fær ikki verið á Toftum hetta kappingarárið.

Tí hevur B68 leitað sær aðrar vegir, og nú er greitt, hvør nýggi málverjin verður. Talan er um 19 ára gamla Tórður Thomsen, sum hevur fingið sína fótbóltsuppaling í NSÍ. Har skal tó nógv til, um ein nýggjur málverji skal senda Jens Martin Knudsen á beinkin, og tí hevur Tórður eisini roynt aðrar leiðir í royndini eftir spælitíð í bestu deildini. Nakrar dystir í ár vardi hann málið hjá ÍF, og komandi kappingarárið verður tað so á Svangaskarði, at ungi maðurin skal royna seg.

Tað hevur eisini ljóðað, at B68 er í ferð við at fáa útlendskan spælara kn‡ttan at liðnum. Eitt nú hevur verið tosað um ein jugoslaviskan álopsspælara, men tey tíðindini eru so ikki váttað enn.



*Hóast síni bert 19 ár, so hevur Tórður longu nakakð av royndum í bestu fótbóltsdeildini*

*Mynd: www.b68.fo*

## Róðrar-móttøka

**MÓTTØKA**
*tíðindaskriv*

Fyrr í ár vóru 25 ár liðin, síðan Róðrarsamband Føroya varð stovnað. Í hesum sambandi verður skipað fyri móttøku fyri fyrrverandi nevndarlimum, dómarum, hjálparfólkum, feløgum, rógvarum og øðrum róðraráhugaðum.

Móttøkan verður í Müllers Pakkhúsi leygardagin tann 17. desember 2005 kl. 16-19.

Til móttøkuna verður møguleiki at fáa gløgg og holukøkur. Á skránni verður eisini myndaframsýning við nýggjum sum eldri myndum, sum á besta hátt lýsa kappróðurin hesi farnu 25 árini.

Í samband við tiltakið er ætlanin at vísa ymiskar róðrar á stórskíggja í miðbýnum í Havn. Á henda hátt ber til hjá øllum róðraráhugaðum at minnast aftur á góðar, gamlar dagar, meðan man kann gleðast um, at komandi kappingarár um stutta tíð er fyri framman, og at bátar tá aftur vera drignir úr neystum.

SÍ-Fleyr 3-1 (30-28, 25-20, 22-25, 26-25):

## SÍ reistist í treiskni

Eftir rokið, sum hevur verið í útlendingamálinum, var tað sjálvandi alt annað enn góðar fortreytir, sum sørvingar høvdu, tá teir í gjárkvøldi tóku móti oddaliðnum Fleyr.

Men sum tað so ofta hevur verið sæð fyrr, so førdu vána kringstøðurnar bara enn meira treiskni inn á SÍ-liðið. Við stórspæli frá serliga Jón Nielsen og Jóhan Petur á Stongum, góvu teir mótstøðuni ein skarpan gang, og tað eydnaðist eisini at vinna dystin.

3-1 gjørdist úrslitið, men sum settúrslitini staðfesta, so var talan um mest sum óhugnaligan spenning. Fyrsta settið varð sera drúgt, áðrenn heimaliðið skapti sær fyrimunin, og so leikaði tað annars sera javnt á. Ikki minst í seinasta settinum, har tað tó eydnaðist vertunum at taka stikkið heim.

Við sigrinum er spenningur av álvara aftur komin í meistaradeildina hjá monnum. Fleyr hevur annars verið í serflokki besta liðið fyrstu nógvu umførini. Tapið hjá teimum hesa ferð var soleiðis tað fyrsta á árinum. Og tó at teir enn mugu roknast sum favorittar, so gevur úrslitið hjá sørvingum trúgv uppá, at oddaliðið kann syftast.

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 8 | 7 | - | 1 | 22 | 10 | 12 | 14 |
| 2 SÍ | 8 | 6 | - | 2 | 21 | 10 | 11 | 12 |
| 3 Mjølnir | 8 | 4 | - | 4 | 17 | 13 | 4 | 8 |
| 4 ÍF | 7 | 2 | - | 5 | 11 | 17 | -6 | 4 |
| 5 Nøvan | 7 | 0 | - | 7 | 0 | 21 | -21 | 0 |

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo